Álit

í

løgtingsmáli nr. 44/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagføring av vardum bústøðum (Hækka játtan og leingja sólseturáseting)

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 8. novemberr 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9., 16. og 22. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg, saman við Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum um at broyta løgtingslógina um dagføring av vardum bústøðum er bæði at leingja sólseturásetingina við fýra árum, soleiðis at lógin fer úr gildi við árssenda 2027 og at hækka fíggjarkarmin við 8,5 mió. kr. til tess at halda fram við at dagføra verandi bústovnar. Samlaði fíggjarkarmurin fer við hesum úr 33,0 mió. kr. uppí 41,5 mió. kr. Tó verður ætlanin um at útvega fleiri búpláss enn tey, ið longu eru komin ella eru í umbúna, slept. Nevndin tekur undir við ætlanini um at lækka talið av nýggjum búplássum vísandi til tilmælini í álitinum "Í góðum hondum".

Undir viðgerðini er nevndin kunnað um, at tað eru bústovnar, har nýggjastu brunakrøvini og krøvini um atkomu møguliga ikki verða fylgd, og nevndin staðfestir, at tað hevur týdning, at hesi viðurskifti koma upp á pláss.

Harumframt er ætlanin at brúka økta fíggjarkarmin til aðrar fyriskipanir heimilaðar í lógini um almannatrygd og tænastur. Talan kann t.d. vera um tænastur sambært § 44 um hjálp í sambandi við harðskap. Í hesum sambandi hevur nevndin fingið upplýst, at tað til dømis kann vera talan um fyribils bústað eftir at hava fingið hjálp frá Kvinnuhúsinum.

Fyri at akførini hjá Almannaverkinum eisini í framtíðini kunnu brúkast í sambandi við hesar stovnar, verða løðistøðir eisini fevndar av hesum fíggjarkarmi.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 23. november 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	